gult14 cyan14 magenta14 svart14



## Javnur fiskiskapur í Barentshavinum

Fiskiskapurin í Barentshavinum hevur seinastu trý árini ligið á einum jøvnum støði. Men broytingar eru í hvussu fiskurin verður viðgjørdur. Í fjør vóru 93.900 tons av toski úr Barentshavinum landað í Norður Noregi. Harav 26.800 tons landað av útlendskum skipum, serliga russiskum. Meðan norðurnorsk fiskavirki undanfarin ár hava virkað eini 80 prosent at veiðuni útlendsk skipa leggja upp, er hetta nú lækkað við eini helvt. Toskurin hjá russum verður nú frystur í stórum frystihotellum og síðan sendur víðari til Kanada og Kina til víðari virking.

Myndugleikarnir í Russlandi eru sera sinnaðir í at fáa russisk skip at landa í Ruslandi. Men hetta verður neyvan í nærmastu framtíð, tí prísurin er nógv hægri venstafyri.

## Minsta mátið ov lítið

Fiskimenn í Suðurnoregi bera ótta fyri, at tað kann enda galið, verður minstamarkið á toski ikki sett upp. Í løtuni er minsta markið 30 sentimetur, ella sum ein lítil greipufiskur.

– Fyri 10 árum síðan skutu vit upp, at seta minsta markið til 42 sentimetrar, men hesum steðgaði Fiskarídirektoratið, sigur Trygvi Bjørnerem í Fylkesfiskerlaget Sør til Intrafish.

Støðan hjá toskastovninum í Norðsjónum er so ring nú at vandi er á ferð og kring allan Norðsjógvin er eitt ynski um at víðka meskavíddina, fyri at steðga skeivu gongdini.

## Nei til oljuleiting

Øll fiskimannafeløgini í Vesterålen siga korta nei til royndarboringar og aðra oljuleiting útfyri Norðurnoregi. Hetta skrivar norska blaðið Vesterålen.

Fiskimenninir halda, at fiskiveiða og oljuvinna kann ikki virka saman og teir vísa til at granskarar hava víst á, at evni, sum oljuvinnan koyrir á sjógv kann ávirka evnini hjá fiski at nørast.

## Óttast ikki russiska kjarnorkusamtykt

Norski stovnurin, Statens Strålevern, óttast ikki fyri at kjarnorkuburturkast verður flutt úr Vestureuropa og fram við norsku strondunum til Russland í nærmastu framtíð.

Russiska tingið, Dumain, samtykti mikudagin eina lóg sum ger tað møguligt at innflyta kjarnorkuburturkast og endurvinna hetta, skrivar Intrafish.

– Russum tørvar ein marknaða, skal hesin dreymur gerast veruleiki. Tað vil siga, at teimum tørvar onkran, sum er villigur at keypa hesa tænastu. Eg dugi ikki at ímynda mær nakað vesturevropeiskt land, ið vil senda kjarnorkuburturkast til Russlands, soleiðis sum støðan er í dag. Russar megna ikki sjálvur at beina sítt egna kjarnorkuburturkast av vegnum, hvussu skulu teir so taka ímóti kjarnorkuburturkastið hjá vesturheiminum, sigur Erling Stranden, Statens Strålevern við Intrafish.

Hann vísir eisini á, at um vestureuropa fór at útflyta kjarnorkuburturkast til Russland, so er óttin fyri eini vanlukku við norsku strendurnar heilt yvirdrivin. Tangarnir við burturkasti, tola eitt nú eld, ella um teir søkka á botn og teir kunnu takast upp aftur seinni, sigur hann. Hann leggur afturat, at óttin er meira av psykologiskum slag, og hesin kann eitt nú ganga út yvir fiskaútflutningin.

FISKIVINNUTÍÐINDI

# Svartkjaftarok undir Føroyum

*Okkara myndamaður fastlæsti hesa myndina av Krúnborg, tá hon lá fulllastað við nýggju bryggjuna á Viðanesi og bíðaði eftir landingartørni í Fuglafirði. Byrjað verður at landað í kvøld*

*Mynd: Jens Kr. Vang.*

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Svartkjafturin er komin í føroyskan sjógv og fleiri bátar liggja og bíða eftir landingartørni á øðrum túrinum. Krúnborg lá á Havnini í gjár fullfermdur av svartkjafti. Hon verður landað í leygarkvøldið. Christian í Grótinum varð landaður í gjár.

– Svartkjafturin hevur tikið seg upp á eini leið beint innanfyri føroyska fiskimarkið í ein útsynning úr Munkinum. Á leiðini royna umframt teir føroysku, átta russar, ein norðmaður og ein dani. Ongin íslendskur bátur er í føroyskum sjógvi, sigur vakthavandi á Vaktar og Bjargingartænastuni.

Svartkjafturin stendur tættur. Teir stóru bátarnir, sum taka yvir 2000 tons royna ikki meir enn tvey samdøgur, so eru teir fulllastaðir. Nú svartkjafturin er komin í føroyskan sjógv er útlíðið og kvotan er farin at minka. Vakthavandi roknar við, at norðmenn veðra sendir til hús einaferð miðskeiðis í mai. Føroyingar eru ikki undir kvotuskipan í føroyskum sjógvi og kunnu royna nakað longri. Tað gjørdu teir eisini í fjør. Tað er TAC ella mest loyvda veiða ásett fyri svartkjast.

Norðborg er á veg til Eskifjørðin í Íslandi at selja. Tróndur í Gøtu er á veg heim við fullari last. Jón Sigursson er á triðja túrinum í Leirvíkini í Hetlandi og landar. Móttøkumøguleikarnir eru ikki so góðir í Hetlandi, at tað loysir seg hjá teim størru nótabátunum at landa har. Jón Sigurdsson er ein at teim minni nótabátunum, hann tekur 800 tons.

Russar eiga eitt systurskip til Christian í Grótinum. Tað roynir eisini í føroyskum sjógvi eftir svartkjafti, men virkar ikki fiskin umborð. Teir hava landað í Íslandi. Onkran túrin í fjør landaðu teir eisini hjá Havsbrún.

Næraberg liggur úti og virkar umborð saman við sjey russiskum trolarum.

# Onki alment veðhald í fiskiflotanum

*Talvan sýnir veðhaldsskyldur landskassans seinastu níggju árini*

*Veðhaldsskyldur landskassans*
*Sektorbólking hjá hagstovuni*

| | Kommunur | SEV | Telefonverkið | Aðrar alm. fyritøkur | Vinnulívið | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 31-dec-2000 | 157 | 22 | 19 | 36 | 7 | 242 |
| 30-jun-2000 | 176 | 23 | 23 | 41 | 8 | 271 |
| 31-dec-1999 | 178 | 27 | 28 | 41 | 10 | 285 |
| 30-jun-1999 | 183 | 27 | 32 | 74 | 13 | 329 |
| 31-dec-1998 | 187 | 32 | 38 | 103 | 32 | 390 |
| 30-jun-1998 | 192 | 32 | 50 | 300 | 54 | 629 |
| 31-dec-1997 | 203 | 36 | 60 | 314 | 58 | 670 |
| 30-jun-1997 | 205 | 38 | 78 | 368 | 73 | 764 |
| 31-dec-1996 | 208 | 44 | 100 | 430 | 73 | 856 |
| 30-jun-1996 | 205 | 45 | 113 | 473 | 81 | 918 |
| 31-dec-1995 | 178 | 51 | 127 | 524 | 109 | 989 |
| 30-jun-1995 | 195 | 53 | 137 | 558 | 124 | 1.067 |
| 31-dec-1994 | 208 | 59 | 152 | 616 | 145 | 1.180 |
| 30-jun-1994 | 217 | 61 | 159 | 685 | 188 | 1.309 |
| 31-dec-1993 | 228 | 62 | 193 | 488 | 198 | 1.177 |
| 30-jun-1993 | 235 | 64 | 202 | 477 | 248 | 1.227 |
| 31-dec-1992 | 239 | 66 | 246 | 560 | 325 | 1.436 |
| 30-jun-1992 | 256 | 68 | 255 | 478 | 454 | 1.413 |

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í 1992 vóru veðhaldsskyldur landskassans 1,5 milliardir krónur og hav átti vinnulívið og serliga fiskiflotin 454 milliónir krónur.

Veðhaldaskyldurnar hjá landskassanum í vinnulívinum eru minkaðar rættuliga skjótt seinastu 10 árini. Í 1995 vóru veðhaldini komin niður á 100 milliónir og í dag eru tey so at siga burtur, tað standa sjey milliónir eftir.

Veðhaædsskyldur landskassans eru í dag 242 milliónir, harav eiga kommunurnar størsta partin, 157 milliónir krónur, veit Hagstovan at siga.

gult15 cyan15 magenta15 svart15

Vikuskifti

Nr. 76 • leygardagur • 21. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Teitur fingið sáttmála

Lesið á síðu 6-7

## Í Føroyum verða djór betur vard enn børn

- Er ivamál um foreldur eru egnað at uppala síni børn, er tað oftast foreldrarættiurin sum vinnur fram um, hvat er best fyri barnið. Alt ov fá standa fram og tosa fyri okkara børnum í Føroyum, alt ov lítil atlit verða tikin til tey, og ofta eru tey í sorli áðrenn nakað verður gjørt, sigur Sólrun Jacobæus, sum eftir sjey ár fer frá sum leiðari á Føroya Barnaheimi

*Venna Mortensen úr HB og Hans Jacob Egholm úr B36 í oldboysdysti í Gundadali 19. apríl 1976 - tá vøllurin varð tikin í nýtslu*

## Nýggi vøllurin tikin í brúk

…Og so tustu idolini frá 50'unum inn á nýggja vøllin. Soleiðis skrivaði Sosialurin fyri 25 árum síðani – tann 21. apríl 1976. Annan páskadag hetta árið, tann 19. apríl, var ovari fótbóltsvøllurin í Gundadali tikin í nýtslu




# 100 teir bestu

**Amerikanska tónleikaritið Rolling Stone og MTV America hava talað. Við útgangsstøði í The Beatles og teirra lending í Amerika, halda tey seg vita, hvørjir hundrað teir bestu poppsangirnir eru frá 1964 og frameftir. Tað finst helst ongin lesari, sum tekur undir við hesi raðfesting. Listin berur eisini greiðar ábendingar um, hvussu ymiskt Evropa og Amerika raðfesta løg. Við føroyskum oyrum munnu fleiri av løgunum kennast sum tann reina tokutala. Lesið her kortini, hvussu 10 tey fremstu løgini sóu dagsins ljós**